## Kvøldseta í Mentunarhúsinum

2. hvítusunnudag 28. mai kl.16:00 skipar Kvøldsetusamtakið fyri sínum sjeynda tiltaki í Mentanarhúsinum við hesum nøvnum á skránni: Kenneth Jørgensen, ið hevur víst góðar gávur sum sjónleikari og sum hevur verið við í øllum sjónleikum, ið Fuglafjarðar Sjónleikarafelag hevur sett upp, síðan Mentanarhúsið var tikið í nýtslu. Lív Næs hevði ein av høvuðsleiklutunum, tá íð sangleikurin Fame vær spældur í Mentanarhúsinum. Hon hevur eisini framført saman við Jan á Líðarenda; millum annað livandi tónleikin í einari av seinnapartssendingunum hjá Útvarpinum í mars mánaða í ár. Í sínari skrá hevur Lív sangir líka frá Poul F. til Poul McCartney. Triðja navnið er Helgi Midjord, sum er kendur fyri sínar inniligu tulkingar og sítt góða gittarspæl. Helgi spælir mest egin løg til yrkingar hjá Janusi Djurhuus, Christiani Matras, Ismari Joensen, Poul F. og øðrum.
Felagið Kvøldsetusamtakið varð stovnað í november í fjør og hevur sum endamál at fáa lív og innihald í Mentanarhúsið í Fuglafirði.

# Djóradagar í dýrdarveðri

Í fjør regnaði av grimd, og tað var kalt, men í ár eydnaðist væl við veðrinum, tá Føroya Ríðingarfelag skipaði fyri djóradøgum á rossaøkinum í Havnadali leygardagin og sunnudagin. Serliga sunnudagin var veðrið av tí allarfagrasta, og hundratals familjur nýttu høvi at síggja ross, hundar, marsvín, dunnur, gæs, slangur, fýrbein og onnur fýrfett djór. Børnini sluppu millum annað at ríða, hoppa á trambolin og á hoppiborg.

Í morgin verður stór myndafrásøgn frá væleydnaða tiltakinum í Havnadali.



*Fólk í øllum aldri hugnaðu sær óført á djóradegnum í Havnadali í góðveðrinum í gjár. Til høgru ein av »the grand old men« í Føroya Ríðingafelag, Viljormur Tórsheim*

*Mynd: Jan Müller*

# Móttøka í barnagarðinum í Nólsoy

**Almenn móttøka var í fríggjadagin í barnagarðinum í Nólsoy. Nógv fólk nýttu høvið at síggja sermerkta bygningin í Látrinum.**

MÓTTØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nógv fólk høvdu leitað sær niðan í nýggja barnagarðin í Nólsoy fríggjadagin, tá Tórshavnar Kommuna hevði boðið til almenna móttøku.

Vælmannnað lið av býarpolitikarumogembætisfólki var komið úr Havn at vera við, og nólsoyingar sjálvir hildu seg heldur ikki aftur.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, legði fyri við at bjóða vælkomin og siga nøkur vælvald orð um sjálvan bygningin, og síðani flutti Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentamálanevndini í kommununi fram røðu, har hon millum annað nevndi, hvør hevði staðið fyri arbeiðinum, og at stovnurin er ein av teimum enn rættiliga fáu, ið lutvíst verður hitaður við sólorku.

Eisini Maud Hansen, næstformaður í Pedagogfelagnum og sjálv nólsoyingur, bar fram kvøðu felagsins vegna.

Undir hátíðarhaldinum var einki meiri náttúrligt, at nólsoyingurin Kim Hansen spældi og sang. Onkran sang eisini saman við barnagarðsbørnunum í Látrinum, sum barnagarðurin eitur.

Gestirnir fingu kaffi, køkur og annað at leska seg við.



*Barnagarðurin í Látrinum í Nólsoy hevði móttøku fríggjadagin*